**8b í Vágs skúla**

Til Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 6/2010: Uppskot til samtyktar um ungdómshús**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Heitt verður á landsstýrið um at leggja fyri Løgtingið uppskot til løgtingslóg um, at allar kommunur í Føroyum verða álagdar at seta á stovn eitt ungdómshús.

**Viðmerkingar**
Endamálið við lógaruppskotinum um, at allar kommunur verða álagdar at seta á stovn eitt ungdómshús, er, at føroyski ungdómurin hevur eitt felags stað, har øll eru vælkomin, og eingin hevur meira rætt at vera har enn onnur.

Eitt ungdómshús fremur felagsskap og samanhald. Á henda hátt slepst undan, at ung sita ensamøll við hús framman fyri telduskýggjanum, ella í bólkum reika runt í gøtunum uttan nakað skilagott at taka sær til. Samstundis verður meiningsleyst herverk, sum kann fara fram, tá ung keða seg, fyribyrgt.

Fíggjarligu viðurskiftini í ungdómshúsinum eru týdningarmikil. Kommunan syrgir fyri húsaleigu og viðlíkahaldi, umframt at seta og løna starvsfólkum í ungdómshúsinum. Tað skal vera ókeypis hjá teim ungu at koma í ungdómshúsið og nýta tey ymisku tilboðini í húsinum, men um ein vil framleiða eitthvørt (t.d. seyma klæðir, gera ein lut úr træspreki, mála myndir) skal viðkomandi gjalda fyri tilfarið. Eisini skal møguleiki vera fyri at keypa mat og drekka í ungdómshúsinum t.d. tvíflísir og smoothies. Harumframt kunnu stuðulsavtalur gerast við ymisk feløg.

Húsfundir skulu javnan haldast fyri teimum, sum brúka ungdómsshúsið, soleiðis, at avgerðir um serlig tiltøk verða tiknar í felag. Møguleiki er fyri at velja ein húsabólk.

**<u>Ungdómshúsið skal vera rús- og roykfrítt</u>**

Uppskot til innihald og regluligt virksemi í ungdómshúsinum:

- Leksiu-kafé v/ leksiuhjálp
- Fyrilestrar
- Møguleiki fyri at spæla tónleik, syngja og drama
- Chillezone
- Temakvøld
- Kreativt virksemi
- Borðtennis
- Billiard

- Wii
- Teldur
- Playstation

**Á Løgtingi, tann 8. februar 2010**

| | | |
|---|---|---|
| Poul Arni Joensen | Henrik Joensen | Una Nolsø |
| Bjarta Hergeirsdottir | Sólrun Henrysdottir | Sára S. Debess |